# Smyril er ein landsvegur og hann skal vera opin so nógv sum gjørligt

Nýggi Smyril er eitt sera stórt framstig, men siglur hann ikki fleiri túrar, er talan kortini um eitt avmarkað framstig



*– Tað er neyðugt, at politiski myndugleikin ger Strandferðsluni greitt, hvussu nógv tað skal kosta at brúka skipini. Príshækkingar á Smyrli seinastu tíðina er dømi um, hvussu neyðugt tað er, sigur Hergeir Nielsen*

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nýggi Smyril er okkara landsvegur til meginøkið í Føroyum. Og Hann er ein landsvegur, sum skal vera opin so nógv sum gjørligt.

Tað heldur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður.

Hann sigur, at ongin ivi er um, at nýggi Smyril er eitt frambrot í ferðasambandinum ímillum Suðuroynna og Havnina.

– Nú fæst altíð tann farmur við, sum ætlanin er at fáa við. Samstundis styttist siglingstíðin ein hálvan tíma.

Men kortini heldur hann, at fæst nýggi Smyril ikki at sigla meiri, er talan hóast alt um eitt avmarkað framstig.

Tí heldur hann, at tað er umráðandi, at nýggi Smyril fæst at sigla oftari.

– Um heilt stutta tíð kann meginparturin av Føroya Fólki koyra í túni hjá hvørjum øðrum og fáa suðuroyingar ikki fleiri túrar, verða vit eftirbátar.

– Tað er neyðugt at gera framstig allatíðina og tí eigur næsta framstigið at vera at Smyril fer at sigla fleiri túrar.

## Ein seinur kvøldtúrur

Eitt nú heldur løgtingsmaðurin, at tað hevur stóran týdning at leggja ein túr úr Havnini til Suðuroynna seinni á kvøldi, so at suðuroyingar í størri mun enn nú, kunnu taka lut í mentanarlívinum í Havn og sleppa heim sama kvøld.

Hann vísir á, at teir seinu kvøldtúrarnir um Skopunarfjørð og Leirvíksfjørð, hava rættiliga stóran týdning fyri fólkið í Norðoyggjum og í Sandoy og teir verða nógv brúktir.

Somuleiðis heldur Hergeir Nielsen at tað er neyðugt at hugsa um framleiðandi vinnuna og at geva henni so stórar fyrimunir av Smyrli sum gjørligt.

– Í fleiri ár hava vit tosað um at lækka farmagjaldið í fleiri ár, men nú tykist tað at vera komið undir land.

Hann sipar til, at tingið hevur akkurát viðgjørt eitt mál um at játta tríggjar milliónir til at lækka farmagjaldið ímillum Suðuroy og Havnina so at tað verður javntstillað við flutningin um Skopunarfjørð og um Leirvíksfjørð.

Hann kennir kortini ikki so nógv til smálutirnir í ætlanini og tí veit hann heldur ikki nágreiniliga, hvussu ætlanin er at lækka farmagjaldið og av tí sama fær hann ikki sagt so nógv um tað.

## Tingið skal stinga út í kortið

Annars heldur hann, at flutningskostnaðurin sum heild hevur so stóran týdning í Føroyum, at løgtingið eigur at fáa høvi at viðgerða flutningskostnaðin um firðir og sund.

– Tað havi eg sóknast eftir í fleiri ár, men tað hevur ikki eydnast enn.

– Tað er ikki nøktandi, at leiðslan á Strandferðsluni ásetir prísin av sínum eintingum. Tað hava ferðafólk við Smyrli eisini sannað til fulnar seinastu mánaðirnar, tí prísirnir á tí, sum verður keypt umborð á Smyril eru hækkaðir heilt munandi og tað er nú nógv dýrari at keypa í kafeteria umborð á Smyrli enn á øðrum Strandfaraskipum og á øðrum almennum stovnum á landi. Tað havi eg gjørt vart við, men landsstýrismaðurin kundi ikki lovað annað enn at kanna málið.

– Einaferð var eisini ætlanin at hækka koyggjurpísin á Smyrli upp í 300 krónur og tað sigur eitt sindur um, hvussu lítið innlit leiðslan á Strandferðsluni hevur í viðurskiftini.

– Tí haldi eg, at tað er neyðugt, at Strandferðslan fær greið boð frá politiska myndugleikanum um, hvussu prísirnir skulu vera, heldur Hergeir Nielsen.

## Skal verða suðuroyarskip burturav

Annars heldur Hergeir Nielsen, at tað er heilt burturvið at tosa um, at nýggi Smyril skal sigla uttanlands.

– Hann skal tæna Suðuroy og tað er ikki pláss til at lata hann sigla uttanlands. Tað er ongin ivi um, at eitt ferðasamband til Skotlands hevði verið ein vinningur, men tað má vera við einum øðrum skipi, tí hetta skal vera landsvegur suðuroyinga, staðfestir Hergeir Nielsen.

Gamli Smyril hevði sínar avmarkingar í plássi, men eisini í tí, at biladekkið var ov lágt til at nøkta tørvin á flutningi, sum nú er, har bilarnir verða størri og hægri.

– Tær avmarkingar eru burtur nú. Men skal Suðuroy dagførast, krevur tað eisini at nýtt berghol verður gjørt ímillum Tvøroyri og Hvalba, tí tað er so lágt at nógvir nýmótans lastbilar fáa ikki koyrt ígjøgnum tað.

– Og tað er ein spurningur, vit eiga at taka upp sum skjótast, sigur Hergeir Nielsen.




